# Fara at framleiða surimi í Fuglafirði

**Um fjúrtan dagar fer felagið, Viking Fish Protein, at framleiða surimi í Fuglafirði. Verkætlanin er eitt samstarv millum føroyingar og amerikumenn**

SURIMI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Um einar fjúrtan dagar ella so, fer felagið, Viking Fish Protein, at framleiða surimi í Fuglafirði. Framleiðslan fer fram í bygninginum innanfyri Havsbrún, sum áður var makrelvirki. Verkætlanin er prottin úr einum samstarvi, sum verið hevur millum sandavágsmannin, Torfinn Johansen og amerikumenn, sum Torfinn hevur samstarvað við í fleiri ár.



*Soleiðis sær surimi út. Líkist smágrýnutum marsipani.*

### Samstarv

Torfinn sigur, at seinni eru eisini Havsbrún og Føroya Fiskavirking komin uppí verkætlanina, sum hevur verið í umbúna í nøkur ár.

Hann vísir á, at nútímans maskinur eru settar uppá virkinum til endamálið, men brúk verður eisini fyri nøkrum fólkum í framleiðsluni.

- Í fyrstu syfti verður hetta ikki eitt stórt virkið, men gongst sum ætlað, verður virksemið ment so hvørt, sum felagið kann prógva, at dugur er í.

Torfinn sigur, at í øllum Evropu verður surimi í løtuni bert framleitt umborð á Nærabergi. Keyparalondini eru serliga Eysturevropa og Fjareystur, men ES-marknaðurin er tann, sum vinnur mest fram í løtuni.

Sandavágingurin fór í sínari tíð niður til Danmarkar at arbeiða fyri Føroya Fiskasølu, men seinnu árini hevur hann arbeitt fyri grønlendska/ danska felagið, Polar Seafood.

Torfinn hevur búð í Danmark í 19 ár, men er nú fluttur heimaftur til Føroya í samband við verkætlanina í Fuglafirði, har hann situr sum stjóri í felagnum, Viking Fish Protein.

- Í mínum starvi hjá Polar Seafood fekst eg mest við at selja rækjur og svartkalva, men ein partur av mínum virksemi var eisini at selja surimi, sum vit keyptu frá ymiskum veitarum.

Tað var í samband við sølu av surimi, at Torfinn kom at samstarva við amerikumenn, ið hava drúgvar royndir á økinum, bæði innan framleiðslu, góðsku og marknaðarviðurskifti.

- Tað var tískil, áðrenn Næraberg kom higartil lands, at vit byrjaðu at tilrættaleggja tað virksemi, sum nú fer í gongd í Fuglafirði, sigur hann.

Í sínari tíð var Torfinn eisni framleiðsluformaður umborð á Giljanesi.

- Ætlanin var at byrja surimi-framleiðslu í Føroyum saman við amerikumonnum, tí hesir hava tær drúgvastu royndirnar á økinum, men sum tíðin er liðin, hava vit sæð tað skilagóða í at hava tveir aðrar sterkar "partnarar" við okkum, sum nú eru Havsbrún og Føroya Fiskavirking.

### Svartkjaftur

Torfinn sigur, at nú framleiðslan í Fuglafirði fer í gongd, koma amerikumenn higar til lands at leggja lag á.

- Eg haldi, at hetta verður eitt spennandi samstarv, har partarnir hava hvør sína uppgávu í hesi verkætlan, sigur hann.

Spurdur, hvat hann heldur um surimi-verkætlanina við Nærabergi, sigur Torfinn, at Næraberg hevur megnað at selt eina góða vøru úr svartkjafti í Japan.

- Fyrstu royndirnar, sum gjørdar vórðu í Føroyum, vístu, at surimi úr svartkjafti var ikki so væl egnað, men hesa "mytu" hevur verkætlanin við Nærabergi brotið. Surimi úr svartkjafti verður í dag virðismenn við onnur sløg av surimi í Japan, og tað er eitt stórt framstig, sigur hann.

Torfinn sigur, at nú virkið liggur uppat Havsbrún, har nógv túsund tons av svartkjafti verða landað um árið, fer Viking Fish Protein at keypa bestu rávøruna haðani.

- Og øll ráværan verður í fyrsta umfari svartkjaftur, leggur hann aftrat.

Surimi er ikki bara nakað, tú gert. Tað krevur holla servitan, og tí fegnast Torfinn um samstarvið við amerikumenninar.

Torfinn Johansen er útbúgvin konserves teknikari og hevur selt surimi í eini 7-8 ár.

### Hvat er surimi?

Surimi er ein vøra við lítlum og ongum smakki. Vit kunnu siga, at hetta er stabiliserað fiskafars. Øll leys væta og alt feitt er "vaskað" úr farsinum, ið er neutralt. Áðrenn vøran verður fryst, minnir hon mest um smágrýnuta tilfarið í einum marsipanbreyði. Á fakmáli verður sagt, at surimi er ein standardifisera basisvøra í einum produkti.

Í Føroyum vita vit, hvussu eitt nú hýsu-, toska,-ella upsafars smakkar, men fólk, sum liva í einum stórum landi burtur frá havinum, vita kanska nóg illa, hvussu ein fiskur sær út. Tey hava ongantíð sæð ein livandi fisk – uttan møguliga í einum fiskabúri.

Okkum í Føroyum nýtist ikki at tilseta smakki-ella litevni, tá ið vit gera einar fiskafrikadellir. Vit vilja hava tær at smakka soleiðis, sum tær "eiga" at smakka, nevniliga av fiski.

Fyrimunirnir hjá fólki í fjarskotnum londum við surimi er, at tey kunnu seta tann smakk ella lit til vøruna, sum tey vilja. Tískil nýtist surimi ikki at smakka av fiski, um tey heldur vilja, at tað skal smakka av onkrum øðrum, tá ið máturin stendur á borðinum.

Í Føroyum er onkur eisini farin at koyra piparfruktir í eitt nú frikadellir, og tá fært tú tann lit og partvís tann smakk, sum fruktin hevur.

Her heima kenna vit best surimi sum høvuðsevnið í tí, sum rópt verður "crabstick" – ein framleiðsla, sum í sínari tíð byrjaði í Kollafirði.



*Viking Fish Protein keypir svartkjaftin frá skipum, sum landa til Havsbrún*



## UTTAN ÚR HEIMI

# Rænd børn verða seld

**Seinastu tíðina hevur løgreglan í Afghanistan bjargað næstan 50 børnum, sum ránsmenn høvdu tikið, og sum teir ætlaðu at selja.**

BARNARÁN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Nógv børn hvørva í Afghanistan, og fleiri teirra koma ongantíð afturíaftur. Men nøkur verða bjargað, og í gjár kunngjørdi løgreglan, at hon hevur bjargað næstan 50 børnum, sum ránsmenn høvdu tikið og burturflutt, og sum teir ætlaðu at selja av landinum.

Barnahjálpargrunnurin hjá ST, UNICEF, sigur, at talan er um skipað barnarán, og grunnurin ber ótta fyri, at børnini verða seld til skøkjuhús í øðrum londum, meðan onnur fara til lond, har tey verða sett at arbeiða.

Tað er sewrliga í landspartinum Badakhstan, at nógv børn eru horvin, men løgreglan sigur seg eisini hava frætt um fleiri burturflytingar har suðuri í landinum. UNICEF hevur biðið afghansku stjórnina verja børnini, og ES hevur játtað stjórnini meiri pengar til at styrkja løgregluna.

Viðurskiftini í Afghanistan eru sera trupul, tí teir sokallaðu krígsharrarnir, sum hjálptu amerikanarunum at reka Taliban frá, sleppa nú at gera, sum teimum lystir, skrivar NTB. Mannarætindafelagsskapur in Human Rights Watch finst at amerikonsku stjórnini, tí hon letur krígsharrunum bæði pengar og vápn.

# Størsta longsta hægsta



*Ferðamannaskipið "Queen Mary 2" verður størsta, longsta og hægsta ferðamannaskipið, sum fer at sigla um Atlanthavið. Skipið er bygt á Alston-skipasmiðjuni í Nazaire í Fraklandi, har hendan myndin er tikin. "Queen Mary 2" fer fyrsta túrin í januar. Ferðin verður úr Southampton í Onglandi til Fort Lauderdale í Florida*

# Røkke hevur nóg mikið at selja burturav

**Kjell Inge Røkke er komin í trupulleikar, tí hann hevur ikki ráð at gjalda eitt lán, sum fellur til gjaldingar týsdagin. Men norskir fjølmiðlar halda, at hann kann selja burtur av sínum marglætisíløgum.**

Røkke
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tað er fyritøkan Orkla, sum eigur 600 milliónir krónur til góðar hjá felagnum Norway Seafoods, sum Kjell Inge Røkke eigur, og pengarnar skal hann gjalda týsdagin, sigur felagið. Men tað hevur Røkke ikki ráð til, og Orkla hevur tí hótt við at fara eftir privatu ognum hansara.

Og har skuldi verið nóg mikið at taka av. Blaðið Nordlys mælir Røkke til at selja burtur av ognunum, tí so fær hann lættliga goldið lánið. Hann kann eitt nú selja stuttleikaskipið "Reverie", sum hann fyrr hevur roynt at selja fyri 460 milliónir krónur. Í 1999 keypti Røkke eitt flogfar av slagnum Boeing 737 fyri 350 milliónir krónur, og í fjør keypti hann aftur eitt flogfar, eitt Cessna 550, fyri 40 milliónir krónur. Og so er tað marglætishúsið í Stølslia, sum kostaði Røkke 100 milliónir krónur at byggja.

## Dean størsta hóttanin

Øll eygu vórðu vend ímóti fyrrverandi generalinum Wesley Clark, tá teir tíggju demokratarnir, sum ætla sær at bjóða George W. Bush av á forsetavalinum næsta ár, hittust til eitt orðaskifti í New York fyrrakvøldið.

Teir seinastu dagarnar hevur verið tosað um, at Clark tykist vera tann, sum hevur bestu møguleikarnar at vinna á Bush, men orðaskiftið vísti týðiliga, at mótparturin heldur fyrrverandi guvernørin í statinum Vermont, Howard Dean, vera ta størstu hóttanina ímóti Bush. Tað sást millum annað av tí, at tað var Dean, sum fekk tær harðastu ákoyringarnar, skrivar Reuters.

Allir teir tíggju demokratarnir søgdu, at teir fara at broyta skattalættan, sum stjórnin hjá Bush setti í gildi herfyri. Nakrir teirra søgdu, at skattalættin til tey múgvandi skal takast av, men Howard Dean og eitt annað valevni, Richard Gephardt, gjørdu greitt, at verður annar teirra valdur til forseta, verður allur skattalættin tikin av, tí ríkiskassin hevur heilt einfalt ikki ráð til lættan.

## Stórt ozonhol

Holið í ozonlagnum uppi yvir Antarktis nú er tað næststørsta nakrantíð, sigur amerikanska rúmdarumsitingin NASA.

NASA sigur, at tann 11. september var holið 28,2 milliónir ferkilometrar ella á leið sum alt Norðuramerika, og so stórt hevur tað ikki verið síðani á heysti í 2000. Amerikonsku vísindafólkini siga, at ozonholið kemur av evnum, sum innihalda klor og brom, men at sera nógvur kuldi fram við strondinmi á Antarktis ger eisini sítt til, at holið er so stórt, sigur Paul Newman, sum arbeiðir hjá NASA.

Tað eru evni við klori, sum verða latin út í luftina, sum gera, at ozonlagið kring Jørðina viknar, men hendan dálkingin er minkað tey seinastu árini samsvarandi altjóða sáttmálum um umhvørvisvernd, siga amerikonsku granskararnir við týsku tíðindastovuna DPA.

## Sámarnir vilja hava hjálp

Formaðurin í norska Sámatinginum, Sven-Roald Nystø, mælir nú ES til at festa rættindini hjá upprunafólki í grundlógina, sum ES-londini fara at umrøða um stutta tíð.

Mikudagin var eitt serligt ES-orðaskifti í Sámatinginum, og í tí sambandi var ES-sendiharrin, Gerhard Sabathil, boðin á tingfund. Hann vildi ikki geva sámunum nakað lyfti um at fáa rættindini hjá upprunafólki við í grundlógina, men segði málið vera áhugavert. Sendiharrin vísti á, at ES hevur ikki viðgjørt trupulleikar hjá upprunafólki, sjálvt um Finnland og Svøríki komu upp í samveldið fyrst í nítiárunum, men hann helt, at trupulleikarnir eiga at fáa størri ans í komandi tíð.

Við Nordlys segði sendiharrin seg kortini ivast í, hvussu rætt tað er at seta rættindini hjá upprunafólki í sjálva ES-grundlógina. Hann helt, at tey einstøku limalondini eiga at loysa trupulleikarnar hjá sínum upprunafólki, men lovaði kortini at viðgera málið.

## Flogfar verður skrivstova

Skipið, sum siglir millum Esbjerg og Harwich, hevði ein heldur sjáldsaman farm nú um dagarnar.

Millum góðsið úr Onglandi til Danmarkar var eitt flogfar av slagnum Boeing 727. Flogfarið kom ikki til Danmarkar í heilum líki, men í fleiri pørtum. Tað er nú flutt til Århus, har tað skal setast samanaftur, tí ein reklamufyritøka ætlar at innrætta tað til skrivstovu. Í flogfarinum verður millum annað eitt fundarhøli og ein verkstaður.

Tað er marknaðarfyritøkan HC Gruppen, sum hevur keypt flogfarið. Tá tað er sett saman og innrættað, fer tann heldur sjáldsama íløgan at kosta felagnum 15 milliónir krónur, skrivar JydskeVestkysten.